TAKS




# KT/Menningarleiðari

## Til reiðar til eina avbjóðing?

**Hetta starvið** setur krøv til tín kunnleika, eldhuga, tíni kreativu evni og títt nærlagni.

**Tú verður** leiðari á eini deild við tilsamans 5 starvsfólkum, sum bæði er ein KT- og mennningardeild, við ábyrgd fyri egnari fíggjarætlan.

**Tú fær** ábyrgdina av menning, dagføringum og viðlíkahaldi av KT-skipanunum og okkara KT-netumhvørvi. Tú fær eisini ábyrgdina av KT-trygdini.

Saman við leiðsluni á TAKS fert tú at gera langtíðarætlanir, seta mál og gera raðfestingar fyri KT- menningini. Tú skalt eisini samskipa KT- menningina á stovninum, leggja til rættis og leiða KT-verkætlanir og processmenning. Tað verður eisini tín ábyrgd at røkja samstarvið við uttanhýsis KT-veitarar, og at umsita og skjalfesta infrakervið.

**Vit vænta**, at tú hevur viðkomandi útbúgving. Kanst tú vísa á royndir sum leiðari og verkætlanarleiðari, er hetta ein fyrimunur.

Eisini vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevnir og dugir væl at arbeiða í toymi. At tú dugir væl at skipa arbeiðið, hevur fokus á loysnum og megnar at taka avgerðir, umframt at tú virðismetir gott samskifti. Kunnleiki til og áhugi fyri løgfrøði er eisini ein fyrimunur.

**Starvið verður lønt** í 36. lønarflokk í sáttmálanum millum Tænastumannafelagið og Fíggjarmálaráðið, umframt 15% í eftirløn, uttan tó at vera eitt tænastumannastarv. Lýkur umsøkjarin treytirnar, so verður starvið lønt í tráð við sáttmálarnar millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelagið ella Akademikarafelagið.

**Setanarøkið** umfatar Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

**Starvið verður sett** skjótast gjørligt.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Eyðun Mørkøre, stjóra, á telefon 352600 ella við telduposti til eym@taks.fo.

**Umsókn**, lívsrensl, prógv o.a. skal sendast við telduposti til taks@taks.fo, merkt: KT/Menningarleiðari.

**Freistin at søkja** er 29. sept. 2014, kl. 15.00.

Broytingin viðvíkur lønarviðurskiftum og umsóknarfreistini.

www.taks.fo